

» - Eg eri persónliga skeptiskur viðvíkjandi limaskapi í EFTA, tí stovnurin er ein doyggjandi eind. Tað er einki dulsmál, at ES er tað stóra, meðan EFTA er bara næstbest. Hvat er virðir í EFTA, tá Ísland og Noreg fara upp í ES?

*Jóhan Dahl, Sambandstingmaður, Sosialurin 04.08.05*

» - Uttan at gerast partur av EBS samstarvinum, síggi eg ikki stórvegis vinning í at gerast limur í EFTA. EBS avtalan er uttan iva tað berandi í EFTA í dag. Uttan hana er felagsskapurin lítið verdur.

*Inge Lønning, Næstformaðurin í norsku uttanríkisnevndini, Sosialurin 11.08.05*

» - Parturin av EFTA, sum ikki fevnir um EBS samstarvið, vigar ómetaliga lítið politiskt. Eg skal ikki leggja meg út í føroyska ynskið um limaskap, tí tað er nakað tit sjálvir mugu gera av, men eg havi ringt við at fáa eyga á stórvegis fyrimunir at vera limur av EFTA uttan EBS samstarvið,

*Inge Lønning, næstformaðurin í norsku uttanríkisnevndini, Sosialurin 11.08.05*

# ella oyðimørk?

mugu tora at hugsa at tankan, tí ES fevnir also um annað enn fiskivinnu. ES marknaðurin er í dag okkara høvuðsmarknaður og øll orka eigur at vera nýtt at til at virka fyri, at okkara marknaðartreytir við ES verða betraðar.

Gransking og útbúgving eru hornasteinar hjá nærum hvørjum arbeiðsbólki í Visjón 2015, og júst tey bæði økini verða raðfest høgt í ES. ES hevur rammuætlanir innan bæði útbúgving og gransking, og við at krøkja okkum upp í tær, høvdu vit kunnu fingið tiltrongda ferð á granskingina í Føroyum.

## Sterkari fiskivinnusamstarv

Verða Noreg, Ísland og Føroyar at finna saman í EFTA, eru góð útlit fyri einum tættari samstarvi millum tær norðuratlantisku fiskivinnutjóðirnar. Hóast tað ikki er eitt yvirskipað fiskivinnusamstarv í EFTA, so hevði eitt formelt samstarv millum Føroyar, Noreg og Ísland verið gróðrarbotnur fyri, at londini gjørdust sterkari úteftir.

Her verður serliga hugsað um samráðingar við ES, har eitt formelt samstarv gjøgnum EFTA, fór at gera tað lættari hjá Noreg, Íslandi og Føroyum at standa saman og seta hægri krøv til ES-myndugleikar, tá samráðingar um fiskivinnupolitikkin tóku seg upp.

Hóast hesin spurningur framvegis ber brá av at vera teoretiskur, so hava løgmaður og ein norskur politikari longu víst á møguleikan. Hjá Føroyum hevði hetta verið funnin fressur, tí EFTA hevur eitt væl sterkari netverk og størri fyrisiting, og hetta átti betra um møguleikarnar hjá Føroyum at samráðast – ikki minst á fiskivinnuøkinum.

## Politiskur friður

Í politiska landslagnum hevur verið óvanliga friðarligt, síðan kjakið um EFTA tók seg upp. Tað er sjáldan, at allir flokkar á tingi stuðla einum máli, men hetta tykist meira ella minni galdandi í spurninginum um EFTA limaskap.

Tann æviga orrustan um ríkisrættarliga støðu Føroya tykist ikki fyribils at hava gruggað kjakið um EFTA limaskap. Allir løgtingslimir hava ásannað at tað er í tøkum tíma, at Føroyar fáa ein virknari leiklut á uttanríkispolitiska økinum og at betra verður um marknaðaratgongdina hjá føroyskum vørum. Limaskapur í EFTA gongur báðum ynskjum á møti.

Í Føroyum hava stórpolitisk mál lyndi til at drukna í innanhýsis politiskum ósemjum, men breiða semjan millum andstøðu og samgongu í hesum málinum slóðar fyri, at tað er frálíkur møguleiki at fáa nakað ítøkiligt burturúr arbeiðnum á uttanríkisøkinum.

Tað er ikki bert friður á politiska leikpallinum. Bæði arbeiðsgevarar og fakfeløgini plaga ikki at smæðast burturímillum, um politikararnir hava ætlanir, sum teimum ikki líkar. Áhugabólkarnir í Føroyum – serliga innan fiskivinnuna – hava eina ómetaliga stóra styrki, og politikararnir eru mangan hoknaðir í knøunum og hava givið eftir fyri ynskjum teirra. Hetta síggja vit best í teimum mongu seravtalum, sum ávísir samfelagsbólkar hava. Eitt sólarklárt dømi er skattalættin til fiskimenn og handverkarar uttanlands.

Men bæði vinnulív og fakfeløg hava verið óvanliga spøk í málinum um EFTA. Antin eru tey líkasæl, ella síggja tey ongar vandar. At áhugabólkarnir serliga innan føroysku fiskivinnuna ikki eru so eyðsýndir kemur helst av tveimum orsøkum. Hjá reiðarunum ger tað hvørki frá ella til, um Føroyar gerast partur av EFTA, tí fiskivinnupolitikkurin verður sum áður sagt á okkara hondum. Vandin fyri at missa sín einkarætt á føroyska heimasjógvin er snøgt sagt ikki til staðar.

Hóast EFTA limaskapur betrar um samlaðu marknaðaratgongdina hjá føroyskum vørum, so er tað ein givin lutur, at serliga føroyskir fiskaseljarar hava nógv størri tørv á betri atgongd til ES-marknaðin, sum er okkara nógv størsti útflutningsmarknaður.

Tað er rættiliga sigandi, at hvørki politikarar ella fakfeløg geva EFTA nakran ans. Tað er eitt greitt tekin um, at týdningurin av felagsskapinum fyri føroyska samfelagið helst ikki er tann størsti.

Tað má ganga langt ímillum, at løgmaður og hansara embætisfólk hava fingið fríar ræsur at arbeiða uttan at politikarar, vinnulív ella fakfeløg banka upp á dyrnar og seta krøv. Hetta frælsið má geva løgmanni eina tiltrúgv um, at EFTA helst er mest realistiska leiðin at ganga um Føroyar skulu fáa tættari samstarv við Evropa.

Men tú hevur hug at seta spurningin um limaskapur í EFTA ikki bart út er eitt skálkaskjól fyri at gera bara okkurt á uttanríkispolitiska økinum? Tað er í ES - og ikki EFTA , at tey stóru tøkini hava verið tikin seinasta áratíggju.

## Fríhandilsavtalur

Tað er sannroynd, at vit hava havt óvanliga torført at gjørt handilssáttmálar við aðrar tjóðir. Besta dømi um tað er fríhandilssáttmálin við Russland, sum hóast drúgvar samráðingar, framvegis ikki er komin undir land. Men eydnast tað løgmanni at innlima Føroyar í EFTA, fáa vit í einum atgongd til í alt 14 fríhandilsavtalur, sum EFTA hevur undirskrivað. Útlitini fyri øllum hesum fríhandilsavtalum viga uttan iva nógv hjá løgmanni.

Mantraðið í altjóða heiminum í dag er fríhandil. Tað er ein turkatrúgv upp á, at fríhandil tryggjar størri marknaðir, sum víðari tryggja størri vælferð og størri búskaparligan vøkstur. Og hesa trúgv hava føroyskir politikarar tikið til sín.

Ísland og Írland verða javnan nevnd sum tvær tjóðir, vit skulu síggja upp til. Tær hava ein lítlan heimamarkna – eins og Føroyar – men sum hava krøkt seg til størri eindir sum EFTA og ES, og hetta hevur havt við sær, at londini hava blómað við stórum búskaparligum vøkstri. Við at lata upp ístaðinfyri at byrgja seg inni. Vónin er, at um fleiri føroyskar fyritøkur fáa atgongd til ein størri marknað, kunnu Føroyar gera Íslandi og Írlandi bragdið eftir.

Kortini hevur lítið verið kjakast um, hvørjar ítøkiligar møguleikar teir 14 fríhandilssáttmálarnar geva Føroyum. Hvat skalt tú hava 14 fríhandilssáttmálar til, um tú ikki ført nýtt tær til nakað? Tað er áhugavert at leggja til merkis, at samlaði útflutningurin hjá teimum fýra EFTA-londunum bert er 2,3 % til tey londini, sum fríhandilssáttmálar eru gjørdar við. Tí átti størri dentur verður lagdur á, hvørji lond møguleikar eru í enn bara at staðfesta, at talan er um 14 fríhandilsavtalur, tí hvat fara Føroyar at fáa burturúr einum fríhandilssáttmála við Palestina, Tunis ella Makedonia, sum eru trý av londunum?

## Stutt um **EFTA**

Altjóða búskaparligi felagsskapurin EFTA telist í dag millum teir smáu altjóða felagskapirnar. EFTA kom undan kavi í 1960, og felagsskapurin varð tá mettur at vera eitt munagott alternativ til ES. Seinastu árini er talið av limum í felagsskapinum minkað umfatandi, tí tey flestu londini, sum upprunaliga vóru í EFTA eru blivin limir í ES. Í dag eru bert Noreg, Ísland og Liktenstein og Sveis limir í EFTA. Føroyar vóru limir í EFTA frá 1967 til 1972.

## Stutt um **EBS**

EBS er ein stytting fyri Evropeiska Búskaparliga Samstarvið millum. ESB er ein avtala millum ES og EFTA londini. Samstarvið fevnir í høvuðsheitum um , at vørur, kapitalur, arbeiðsmegi og tænastur skulu hava frítt at fara um landamørk. Avtalan millum ES og EFTA kom í gildið í 1992. Noreg, Ísland, Liktenstein eru partur av EBS, meðan Sveis hevur valt at vera uttanfyri.

## Fríhandilssáttmálar hjá **EBS**

Bulgarina, Kroatia, Makedonia, Rumenia, Turkaland, Marokko, Tunis, Ísrael, Jordan, Libanon, Palestina, Kili, Mexico, Singapore.